## EG MEINI TAÐ

# Leikukassin tosar danskt



*Katrin Petersen skrivar*

"Kom så Peddersen, vi skal ud og fiske!", hoyrdi eg undan køksborðinum nú eitt kvøldið. Tað var sonurin, sum var farin at spæla við Findus og Pettson-leikurnar. Eg hvakk við. Tí vit eiga tríggjar bøkur um gamla stavnin og stuttligu kettu hansara, og drongurin plagdi at brúka setningar úr bókunum sum orðatøk. Á føroyskum sjálvsagt, tí bøkurnar eru týddar til føroyskt. Og nú tosaði Findus danskt undir køksborðinum! Og Pettson var blivin til Peddersen.

Inni í stovuni lá upprunin til málskiftið hjá okkara vinmonnum úr bókunum. Ein teknifilmur. Við donskum røddum. Eina einastu viku høvdu vit átt hann, og longu hevði hann skumpað fýra ára lesnað burtur.

Vit eiga eisini Løvernes Konge. Øll í djórakassanum tosa danskt. Og Pokémonfilmar, sum fáa gummiskøddar smádreingir at standa í bønum og rópa "Pikachu, jeg vælger dig!"

Og soleiðis er ikki bara inni hjá mær. Tað veit eg, tí eg hoyri tað, tá børnini spæla saman. Tey spæla á donskum. Ikki bara tey, sum hava búð í Danmark ella hava eitt danskt foreldur. Nei, tað er meira rættvíst at býta tey upp eftir, hvussu nógvar teknifilmar og fylgisveinarásir tey hava til taks.

Okey, eg kundi tikið eina prinsippavgerð og beint allar danskar teknifilmar burtur. Noktað ommu hansara at tendra Cartoon Network (ein teknifilmsrás sum sendir alt samdøgrið um fylgisvein). Aldrin farið í biograf, sum annars er ein uppliving á hædd við pannukakur.

Men í staðin fyri at servera forboð og mammusa politiska correctness fyri dronginum, hevði also verið nógv stuttligari, um Pettson bara tosaði føroyskt í filminum! Og ikki bara stuttligari. Eisini betri málpolitikkur. At geva tær góðu upplivingarnar, nýggjar og stuttligar filmar, á føroyskum. Náttúrligt!

Grundarlagið undir øllum arbeiði at verja føroyskt mál er væl tað, at hetta er okkara móðurmál, okkara fyrsta mál, tað vit duga best at nýta. Á hesum málinum skulu okkara sangir yrkjast og okkara bøkur skrivast. Tí hetta er tað málið, sum okkara hjarta brúkar.

Og hvat so, tá okkara børn IKKI hava hetta málið til at spæla við? Hvat hendir, tá hugflogið sveimar best á donskum við enskum ísletti? Vilja tey so hava henda rættin at kunna brúka føroyskt?

Okkara rithøvundar fara kanska um 25 ár fara at siga sum William Heinesen, at tað fellur lættari at skriva á donskum. Ella á enskum. Tí tað var málið, sum førdi teir á víðar ferðir í ævintýrheimi!

Sá forrestin, at málfrøðingarnir hava skrivað ein orðalista til oljuvinnuna. Føroysk heiti út á boripallarnar. Um teir høvdu spákað sær ein túr fram við einum barnagarði, høvdu teir kanska hoyrt tað sama sum eg hoyri. "Tiiiil angreeb"! Og kanska høvdu teir spurt seg sjálvar, um tað nú er oljuvinnan, sum mest hevur brúk fyri einum málpolitikki. Um tað er har, størsti vandin er fyri at hjartað fer at tosa fremmandamál.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

## GAMLAR MYNDIR

*Lagt til rættis:*
*Birgar Johannessen*

# Tann reyði 10 krónuseðilin






Í 1954 fingu føroyingar nýggjan 10 krónuseðil. Lóg kom í 1949 sum segði, at sermerktir peningaseðlar skuldu gerast fyri Føroyar. Áðrenn hesin nýggi seðilin kom, vórðu brúktir yvirstempladir seðlar, fyribilsseðlarnir, sum Eliesar í Pálsstovu hevði gjørt o. a.

Á forsíðuni á nýggja 10 krónuseðilinum er skjøldur við veðri (Kirkjubøveðrinum). Á seðlinum stendur: »Útgivin sambært...« Stavingin er rættað, tí á 5 krónuseðlinum stendur: »Útgvivin sambart...« og á 10 krónuseðlinum stendur »Ríkisumboðið« meðan tað stendur »Ríkisumboð Føroya« á 5 krónuseðlinum.

Fyri Føroya Landsstýri skrivaði Kr. Djurhuus, løgmaður, undir, og Vagn Hansen skrivaði undir fyri Ríkisumboðið.

Baksíðuna á 10 krónuseðlinum hevur listarmaðurin, Janus Kamban, teknað, og er motivið hansara egna fantasi.

Fyrsta upplagið av hesum nýggja 10 krónu seðli kom við vaktarskipinum Thetis, upplagið var upp á 4 milliónir krónur. Tilsamans bleiv prentað fyrstu ferð eitt upplag upp á 9 milliónir krónur.

Tann reyði 10 krónu seðilin varð inndrigin í 1978.

# MS. Tjaldur



*Myndin er helst tikin sunnudagin 1. februar í 1953, tá nýggja skipið hjá Skipafelagnum Føroyar, MS. Tjaldur kom á Havnina á fyrsta sinni.*
*Tjaldrið skuldi koma kl. 10 á morgni, men varð nógv seinkað, m. a. tí at skipið mátti andøva í illveðri í 12 tímar á leiðini, sum tí gjørdist nakrar tímar longri enn ætlað.*
*Ikki fyrr enn langt út á seinnapartin kom so Tjaldrið flaggskrýtt inn um molan.*
*Sum tað sæst á myndini var svart av fólki og tók ímóti nýggja skipinum hjá Skipafelagnum.*
*GHM og Havnar Sangfelag gjørdu løtuna sera hugnaliga. Nógvar røður vórðu hildnar. Løgmaður, býráðsformaðurin, J. P. Hendriksen, Zach. Niclasen (á Skipafelagnum) og Páll Patursson vórðu millum røðararnar.*
*Við Tjaldrinum fyrsta túrin vóru gott 100 ferðafólk, 800 tons av stykkjagóðsi og 14 tons av posti.*
*Myndaeigari: Kári Arge*





*Hallgrim og Elinborg Miðberg hittust í bakarínum í 1962, og hava verið har síðani*



*Elinborg Miðberg avgreiðir framvegis kundarnar í handlinum*



*Starvsfólkið hevur trivist væl í bakarínum. Oddur Heinesen, h.m., hevur bakað hjá Miðberg í 32 ár*

# Rann saman í bakarínum

## Tey hittust í bakarínum, Hallgrim og Elinborg Miðberg, og har hava tey verið í skjótt 40 ár. Nú er bakaríið selt, men navnið Miðberg verður verandi

HJÁ BAKARANUM

*Edvard Joensen*
*Myndir: Edvard Joensen*

**Saltangará:** Tey byrjaðu í bakarínum sama dag fyri skjótt 40 árum síðan. Og síðan hava tey hildið saman, Elinborg og Hallgrim Miðberg í Saltangará. Í dag er Bakaríið selt, men navnið Miðberg fer framvegis at standa á skeltinum.

– Eg kom úr Vestmanna og hevði ongantíð verið í Eysturoynni fyrr, hóast eg hevði verið runt Afrika, greiðir Hallgrim Miðberg frá.

– Eg byrjaði sum bakarasveinum hjá Antoni Johannesen. Sama dag byrjaði ein nýggj genta í handlinum, og har hava vit so verið síðan, hóast bakaríið hesi árini hevur verið í trimum húsum.

Í húsinum við síðuna av posthúsinum í Saltangará liggur bakaríið hjá Miðberg. Tað hevur verið í hesum húsinum síðan 1978 og fer framhaldandi at verða í sama stað, hóast eigararnir nú verða nýggir.

Vit spyrja eftir bakaranum, og fáa at vita, at hann er har inni aftanfyri. Jú, hann er við at taka breyð úr ovninum. Tekur fleiri samansettar formar við rugbreyðum, sum hann hvølvir á borðið, haðani tey beinanveg verða tikin frá til at koyra út til ymsu kundarnar, sum skulu hava breyð.

Úti í handlinum stendur Elinborg enn, sum hon gjørdi tann dagin í august 1962, tá verðinsmaðurin úr Vestmanna, sum ongantíð hevði verið í Eysturoynni, byrjaði at baka í Runavík.

Hallgrim Miðberg greiðir frá, at hann lærdi at baka hjá Frants Restorff í Havn, har hann varð útlærdur í 1960.

Hann helt tó ikki fram í bakarayrkinum beinanveg, tí hann fór út at sigla. Hann fór við einum norskum farmaskipi og var millum annað ein túr runt Afrika, úti á Madagaskar og á Mauritius.

### Inn í Eysturoynna

Heim aftur komin sá hann, at Anton Johannesen, bakari í Runavík, søkti eftir bakarsveini. Hallgrim søkti og fekk starvið.

Tann 21. august 1962 byrjaði hann at baka í teimum húsunum, sum í dag hýsa Runavíkar Býráði.

– Tað er í grundini nokk so stuttligt, heldur Hallgrim. Tí annar teirra, sum nú hevur keypt bakaríið, er borgarstjórin, sum í dag ræður í sama húsi.

Tað gekk heilt stutt tíð, til gamli bakarin gjørdist sjúkur, greiðir Hallgrim frá. Og bara eini tvey ár eftir, at hann var byrjaður í bakarínum, hevði hann yvirtikið tað. Tá var hann sjálvur annar í bakarínum, og tvær genturi handlinum.

Saman við sjálvari fyritøkuni fylgdu eisini starvsfólkini, og serliga ein yvirtøka gjørdist øðrvísi enn hinar.

Væl hevur verið elt og bakað, tí árið eftir at Hallgim Miðberg hevði keypt bakaríið frá Antoni Johannesen, giftust hann og Elinborg Knudsen, sum bæði byrjaðu sama dag í fyritøkuni.

Tey hildu so fram í sama húsi til 1969, tá bakaríið flutti longri inn á fjørðin.

Og í 1978 bygdu tey so tann bygningin, har bakaríið hjá Miðberg húsast í dag. Sjálv búðu tey tá í erva, men eru seinni flutt í onnur hús at búgva.

### Broytingar

Jú, broytingarnar hava verið stórar, greiðir Hallgrim Miðberg frá. Alt samfelagið er jú broytt, so tað er greitt, at tað mátti merkjast hjá bakaranum eisini.

– Tá eg byrjaði, vóru fýra bakarar í Eysturoynni. Ein á Skála, ein í Gøtu, ein í Fuglafirði og so vit. Tann  í Gøtu er nú givin, meðan bakarí enn eru í Fuglafirði og á Skála.

Vøra varð koyrd út til kundarnar við hýruvogni, greiðir hann frá. Tveir plagdu teir at vera, sum líkasum skiftust um at koyra fyri bakaran. Til Rituvíkar og Æðuvíkar. Inn á Skipanes og eisini út á Toftir, koyrdu teir.

Tá Hallgrim Miðberg keypti bakaríið, keypti hann sær eisini ein vøruvogn. Hann kostaði 12.000,- krónur, minnist hann.

Í dag verður vøran eisini koyrd út til kundarnar, men nú er tað bara upp aftur longri teinur. Heilt til Eiðis og Norðskála verður nú farið.

Í dag eru 14 fólk í føstum starvi á bakarínum, umframt onnur, sum arbeiða styttri tíð. Og umsetningurin er vaksin frá umleið 125.000,- krónum, tá Hallgrim Miðberg yvirtók, til einar sjey milliónir í dag.

### Trivist væl

Hallrim fer yvir til eitt borð, har teir standa og elta breyð. Tekur deiggj og letur ongan iva vera um, at hetta hevur hann gjørt fyrr.

Aftan fyri hann stendur Oddur Heinesen við eina rørimaskinu. Hann hevur bakað hjá Miðberg í 32 ár, greiðir Hallgrim frá.

– Jú, bæði vit bæði og arbeiðsfólkið sum heild hava trivist væl, heldur hann.

Tað var eitt sindur av ótryggleika á summum, tá tað frættist, at hann fór at selja, greiðir Hallgrim Miðberg frá. Men tey fingu skjótt at vita, at alt fór at halda fram sum áður. Og tað fara starvsfólkini eisini at gera.

Sofus Hansen, sum er annar av nýggju eigarunum, kemur í bakaríið at arbeiða.

– Hann kemur líkasum heimaftur, heldur Hallgrim, tí hann hevur lært her og eisini arbeitt her í fleiri ár.

Jú, tey fara uttan iva at fáa tíðina at ganga, bæði Elinborg og Hallgrim Miðberg, hóast tey ikki vera í bakarínum.

– Vit sleppa so at vera omma og abbi fulla tíð, um vit vilja tað.